# Undirvísingar- og mentamálastýrið
# Mentamáladeildin

## Sjúkrasystraskúli Føroya verður útbygdur við nýggjum útbúgvingum

Sjúkrasystraskúli Føroya fer eisini at fevna um tær nýggju almanna- og heilsuútbúgvingarnar. Í hesum sambandi verður skúlin styrktur við tveimum nýggjum deildarleiðarastørvum, t.e. einum deildarleiðara til hvørja útbúgvingarrás og einum felags rektara, ið fara at hava tætt samstarv. Hesi trý størv verða her lýst leys at søkja.

### Rektari

**Høvuðsuppgávur**
- Samskipan av útbúgvingunum
- Ábyrgd av málum viðv. starvsvenjingarplássum
- At skipa eina neyva fíggjarstýring
- Fyrisitingarligar uppgávur, t.d. at orða karmar, leiðreglur og normar fyri virksemi skúlans og starvsfólkamál
- Upptøka av lesandi og næmingum
- At røkja samskiftið við avvarðandi myndugleikar
- At taka lut í nevndararbeiði, fyriskipað av Undirvísingar- og Mentamálastýrinum
- At skipa fyri eftirútbúgving av egnum starvsfólki og bjóða út skeið
- Menningarvirksemi sum heild
- Ein ávís undirvísingarskylda

**Vit sóknast eftir einum rektara, ið**
- er sjúkrasystir við viðkomandi hægri útbúgving ella eftirútbúgving, og sum
- hevur vitan um og royndir innan námsfrøði og leiðslu
- hevur skil fyri fíggjarstýring og fyrisitingarligum viðurskiftum
- dugir væl at fyrisita/leiða og samstarva
- hevur royndir innan undirvísing og annað námsfrøðiligt virksemi.

Tað er av týdningi, at rektarin er før/ur fyri at leiða og fyrisita báðar útbúgvingarrásirnar, hevur virðing fyri og fatan av fakligum og persónligum margfeldi, og kann virka í góðum samstarvi við starvsfelagar. Rektarin skal kunna savna, samskipa og hava yvirlit. Rektarin skal vera menningarsinnað/ur og kunna fáa í lag eitt álitisfult og mennandi samstarv bæði innan- og uttanhýsis.

Rektarin verður við til at seta bæði deildarleiðarastørvini.

### Deildarleiðari fyri sjúkrasystraútbúgvingina

**Høvuðsuppgávur**
- Vararektari tá rektarin er burturstaddur/burturstødd
- Gerð av útbúgvingarætlan
- Fyrisiting og ábyrgd av útbúgvingini
- Planleggja og gera tímatalvu, evnisarbeiði o.l.
- Viðgera mál viðvíkjandi lesandi
- Menningaruppgávur
- Undirvísa uml. helvtina av arbeiðstíðini

Vit sóknast eftir einum persóni, ið
- er sjúkrasystur við viðkomandi hægri útbúgving ella eftirútbúgving
- hevur vitan um og royndir innan útbúgvingarviðurskifti á hægri støði innan heilsuøkið
- hevur royndir innan gerð av útbúgvingarætlanum
- hevur royndir innan námsfrøði og leiðslu til at røkja ta dagligu fakligu og námsfrøðiligu leiðsluna av sjúrkasystraútbúgvingini
- skal kunna samstarva við hinar leiðararnar, til at skapa eitt mennandi og skapandi umhvørvi fyri næmingar, lærarar og starvsfólk.

### Deildarleiðari fyri almanna- og heilsuútbúgvingarnar

**Høvuðsuppgávur**
- Gerð av útbúgvingarætlan
- Fyrisiting og ábyrgd av útbúgvingunum
- Planleggja og gera tímatalvu, evnisarbeiði o.l.
- Viðgera mál viðvíkjandi lesandi
- Menningaruppgávur
- Undirvísa uml. helvtina av arbeiðstíðini

Vit sóknast eftir einum persóni, ið
- hevur hægri útbúgving, ið kann metast at vera viðkomandi fyri almanna- og heilsuútbúgvingarnar
- hevur vitan um royndir innan útbúgvingarviðurskifti innan heilsuøkið og innan miðnámsútbúgvingar
- hevur royndir innan gerð av útbúgvingarætlanum
- hevur royndir innan námsfrøði og heilsu til at røkja ta dagligu fakligu og námsfrøðiligu leiðsluna av almanna- og heilsuútbúgvingunum
- skal kunna samstarva við hinar leiðararnar, til at skapa eitt mennandi og skapandi umhvørvi fyri næmingar, lærarar og starvsfólk.

**Vit bjóða**
Trý størv við avbjóðing, har tú verður við til at skapa sjálvt starvið, eins væl og ta víðari menningina í skúlanum. Tú fer at arbeiða í einum spennandi umhvørvi við skiftandi uppgávum tætt saman við skúlamyndugleikunum og stovnum innan undirvísing og mentan.

**Setanar- og lønartreytir**
Størvini verða sett skjótast gjørligt. Løn og setanarviðurskifti sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Sjúkrasystrafelag Føroya ella avvarðandi yrkisfelag.

**Umsókn**
Umsókn við upplýsingum um útbúgving, fakligar og námsfrøðiligar royndir o.a. verður at senda til:

**Undirvísingar og Mentamálastýrið**
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 26.06.2000, kl. 15.00.

Umsøkjari verður biðin um at upplýsa, hvat av størvunum søkt verður um, og um umsóknin møguliga fevnir um fleiri av størvunum.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Kristionnu S. Jacobsen, fulltrúa í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum á tlf. 355050.

**Undirvísingar- og mentamálastýrið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og ymiskum frítíðarvirksemi.

**Sjúkrasystraskúli Føroya** verður útbygdur til eisini at umfata tær nýggju almanna- og heilsuútbúgvingarnar, og fer sostatt at hava tvær útbúgvingarrásir. Onnur rásin er sjúkrasystraútbúgvingin, ið er ein miðallong framhaldsútbúgving, 45 mðr., og hin rásin fevnir um tær nýggju almanna- og heilsuútbúgvingarnar. Hesar umfata 1 ára longu almanna- og heilsuhjálparaútbúgvingina og 1 1/2 ára longu almanna- og heilsurøktaraútbúgvingina. Í løtuni eru um 9 størv á Sjúkrasystraskúla Føroya og økist hetta væntandi nakað, tá tann nýggja skipanin er farin at virka.

---

## Tekniski Skúlin í Tórshavn søkir lærarar

**2 tímalærarar til el-deildina**
Størvini eru tímalærarastørv, við møguleika fyri føstum starvi seinni.

Umsøkjarin skal hava sveinabræv sum elektrikari, hava prógv sum el-installatørur og minst 2 ára starvsroyndir innan yrkið. Umsøkjarar við hægri útbúgving hava fyrimun. Eisini er áhugi fyri stødd-, alis- og evnafrøði, og nýtslu av EDV ein fyrimunur.

**Løn**:
Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og FTL.

Størvni skulu setast skjótast tilber og í seinasta lagi 1. august 2000.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving, viðmælum og starvstíð skal vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 13. juni 2000.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til skúlan, tlf. 31 19 57.

**Tekniski Skúlin í Tórshavn**

---

TOR SHIPPING

## Bátur til sølu

Vegna eigaran selja vit vælútgjørdan línubát í góðum standi, um hóskandi boð fæst. Báturin verður seldur við øllum loyvum og er í flokki 4B.

Áhugað biðjast venda sær til

**TOR SHIPPING**
Tlf. 31 85 31

---

## Lærarar skúlaárið 2000/2001

Søkt verður eftir 4-5 lærarum fyri skúlaárið 2000/2001.

Talan er um vanligar lærugreinir í 1.-10. fl. Tó hava lærarar, sum kunnu undirvísa í motorlæru, fyrimun.

Størvini, sum eru tíðaravmarkað, verða lønt sambært galdandi avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Umsóknir saman við ljósriti av próvskjali verða at senda skúlanevndini í seinasta lagi **týsdagin 13. juni kl. 16.00.**

**Fuglafjarðar skúlanevnd**
v/Terja á Lakjuni
FO-530 Fuglafjørður

---

## Avloysari fyri pedagog

Søkt verður eftir avloysara fyri pedagog í barnsburðarfarloyvi í tíðarskeiðinum frá 1. juli 2000 til 31. januar 2001.

Arbeiðsplássið er Sambýlið í Brúnagøtu 7 í Havn, sum er eitt sambýli fyri fólk við sálarligum trupulleikum. Sambýlið er nýstovnað og ætlanin er, at við ársenda skulu fýra fólk búgva har.

Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur royndir í at arbeiða við fólki við sálarligum brekum.

Starvið er normerað til ein pedagog, men um eingin skikkaður pedagogur søkir, verður starvið sett við fólki við øðrari hóskandi útbúgving ella royndum.

Nærri fæst at vita um starvið við at tosa við Julionnu N. Foldbo á tlf. 321277, ella Bjarna Clementsen á tlf. 315426.

Umsóknarfreistin er 18.06.00.

Umsóknir skulu sendast til:

**Serstovnadeildina**
Sigmundargøtu 5
FO-100 Tórshavn

---

VØGGUSTOVAN OG BARNAGARÐURIN Á KONMANSMÝRU

## Starvsfólk

**Barnagarðurin** søkir 1 pedagog 35-40 tímar/vikuna og 1 pedagog 30 tímar/vikuna frá 1. august 2000 ella eftir nærri avtalu. Søkja ongir pedagogar hava vit hjálparfólk til størvini.

Meiri fæst at vita við at ringja til leiðaran, tlf. 317878.

**Vøggustovan** søkir ein pedagog 40 tímar/vikuna í eitt ár frá 15. august. Hjálparfólk 30 tímar/vikuna í eitt ár frá 15. august. Ein avloysara fyri pedagog í barnsburðarfarloyv-ið 26 tímar/vikuna frá 15. juli.

Søkir eingin pedagogur størvini, verður hjálparfólk sett í staðin.

Meira fæst at vita við at ringja til leiðaran á tlf. 313131.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálastýrið.

Vøggustovan og Barnagarðurin á Konmansmýru er ein sjálvsognarstovnur við 32 børnum í vøggustovuni og 3 stovur við 20 børnum á hvørjari í barnagarðinum.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmæli skal vera okkum í hendi seinasta 23. juni 2000.

**Vøggustovan og Barnagarðurin á Konmansmýru**
Hoyvíksvegur 41 B, • 100 Tórshavn

---

P/F GRANNSKOÐARAFELAGIÐ
RASMUSSEN & WEIHE

## Bókhald

Fyri ein av kundum okkara í Tórshavn søkja vit eftir einum avloysara til bókhald og skrivstovuarbeiði.

Arbeiðið umfatar bókhald og annars alt vanligt skrivstovuarbeiði.

Tann, sum settur verður í starvið, má kunna arbeiða sjálvstøðugt. Praktiskar royndir eru tí ein treyt.

Løn sambært avtalu.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi týsdagin 13. juni 2000. Nærri upplýsingar kunnu fáast við at ringja til Rasmussen & Weihe, lokal 23.

**RASMUSSEN & WEIHE**
Statsautoriserað grannskoðarafelag P/F
**An associated firm of** PRICEWATERHOUSECOOPERS

Á Glaðsheyggi
P.O. Box 30
FO-110 Tórshavn
Tlf. (+298) 311017
Fax (+298) 311018

Sp/f nr. 267
e-mail:
rasmussen @rasmussen.fo
Http://www.rasmussen.fo

---

## TIL FØROYSKA BÚNAN

**TIL BØRN: Tin & silvur plet.**
**TIL VAKSIN: Silvurplet & sterling.**
**HEIL SETT ELLA STØK**
**T.d. Møtlaspennir • Brosjur**
**Spennir • Mallur • Stimar**
**Knappar o.a.**

*Fæst hesi støð:* Suðuroyar Heimavirki, Eysturoyar Heimavirki, Norðoyar Heimavirki, Prýði flogvøllurin og Sirri í Vágsbotni.
Framleitt hevur TORGERÐ SUÐUROY 373169

Sosialurin - 311820

---

## Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Peugeot 406 2,0 ST HDI
**Árg.:** 1999
**KM:** 9.900

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú, og kann síggjast á Bilverkstaðnum hjá John Heinesen, Klaksvík.

TRYGGINGARFELAGID FØROYAR
tlf. 456190 • fartelefon 286595
fax nr. 456527
Ólavur Samson

---

## Stuðulspedagogar

**Stuðulsfólkaskipanin í Tórshavnar kommunu søkir eftir stuðulspedagogum.**

**Arbeiðið**
Søkt verður eftir stuðulspedagogum bæði til familjudeildina og til serdeildina í stuðulsfólkaskipanini. Stuðlarnir taka sær av uppgávum við børnum og ungum (0-18 ár) bæði á dagstovni, í frítíðaransingini, í heimum og í øðrum viðurskiftum. Í serdeildini er talan um børn og ung, ið bera brek, meðan familjudeildin tekur sær av børnum og ungum, ið hava aðrar trupulleikar.

Eitt nú sóknast vit eftir t.d. pedagoglesandi, ið eru áhugað at hava eina uppgávu seinrapartar á degnum uml. 10 t. um vikuna.

Eisini verður søkt eftir fólki til eitt tiltak fyri børn og ung menningartarnað í Havn (børn í skúlaaldri og eldri). Talan er um at skapa frítíðarkarmar til ein barna- og ungdomsbólk, og er hetta eitt nýtt og áhugavert tiltak, har arbeitt verður tætt saman við øðrum stuðlum. Væntandi fer tiltakið í gongd hálvan august 2000.

**Førleikakrøv**
Ynskiligt er, at umsøkjararnir hava royndir við børnum og innan tað sosialpedagogiska arbeiðsøkið. Avgerandi er, at viðkomandi hevur hug og evni til at arbeiða við børnum og familjum, ið hava trupulleikar. Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin er búgvin, torir at tosa um forðingar í arbeiðinum og er opin fyri menning í arbeiðinum.

**Setunarviðurskifti**
Sum liður í arbeiðinum verður skipað fyri supervisión og skeiðvirksemi. Arbeiðstíðin kann verða full tíð ella parttíð. Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri.

**Meira fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Honnu Jacobsen, leiðara í stuðulsfólkaskipanini, ella Eyðun Jensen, sosialdeildarleiðara, tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal verða Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 18. juni 2000. Merk umsóknina "Stuðulspedagogur"

Tórshavnar kommuna

---

## Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Mazda 323 2.0 Diesel LX – 4 hurðar
**Árg.:** 06.01.1998
**KM:** 58399

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú, og kann síggjast á bilverkstaðnum hjá Símun Paula og W. Berg, 480 Skála.

TRYGGINGARFELAGID FØROYAR
tlf. 345600 • beinleiðis 345726
fartelefon 288592 • fax nr. 345607
John Ellefsen
at hitta millum kl. 10.00-12.00